# Nøvn



Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

## Fyri 25 árum síðan:

# Friðargongur og nýggj Perla

**Tíðindablaðið Sosialurin skrivar týsdagin 28. mai 1985 um m.a. eina friðargongu úr Mjørkadali og út á Skansan og um eitt uppskot um nýggja Perlu í Vágsbotni**

Meðan kalda kríggið var í hæddini, var vanligt at skipað varð fyri friðargongum 2. hvítussunnudag. Í 1985 byrjaði friðargongan í Mjørkadali. Síðan varð gingið til Havnar, har fundur var á Skansanum. Dagurin endaði við einum stórum tiltaki í Norðurlandahúsinum.

Tá fyrrverandi matstovan Perlan í Vágsbotni varð tikin niður, samtykti Tórshavnar býráð at nýggjur bygningur skuldi koma fyri tann gamla. Fleiri arkitektar komu við sínum uppskoti um, hvussu ein nýggj Perla kundi síggja út. Ein av teimum var Jónhild Johannesen, ið hevði gjørt eina nýggja Perlu sum høvuðsuppgávu á Arkitektskolen í Århus.

Bygningurin skuldi verða í trimum hæddum við eini gólvídd upp á tilsamans 375 fermetrar.

Arkitekturin hugsaði sær, at Perlan skuldi verða eitt alment savningarstað, har kjallarin skuldi nýtast til mentanarlig endamál, á miðhæddini skuldi verða ein kaffistova og á ovastu hæddini ein matstova. Tilsamans skuldi Perlan kosta umleið fimm milliónir krónur at byggja.

*Kelda: Tíðindablaðið Sosialurin týsdagin 28. mai 1985*



tíðindablaðið
sosialurin

Vit mugu upplýsa og arbeiða ímóti krígsørskapinum

*Friðargongan á veg niðan á Skansan í Havn*



*Jónhild Johannesen sæst her saman við Leivi Johannesen, Tórfinni Smith og Essa Arge býráðslimum, tá projektið varð sýnt fram í býráðssalinum. Perlan sæst millum Sjómansheimið og Bryggjubakka*

# Merkisdagar

### 60 ára føðingardagur

Mikudagin 4. august verður Heiðveig Tindskarð, Tórshavn, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 20. juni á tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

### 85 ára føðingardagur

Mikudagin 2. juni verður Ásla Dam, Tórshavn 85 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum, og eru tey, sum ynskja at heilsa uppá Áslu, vælkomin millum kl. 15.30 og 18.

### Silvurbrúdleyp

Tann 1. juni hava Elsba og Eivind Danielsen verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 3. juli í B36 húsinum kl. 19. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 321932 ella 224802 í seinasta lagi 20. juni.

†

## ANDLÁT

Okkara kæri sonur og beiggi

**Hans Pauli Olsen,**

andaðist 26. mai 2010 og jarðarferðin verður í Hundige kirkju týsdagin 8. juni kl. 12.00.

***Familjurnar vegna***

***Jenny og Josva***

## TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda umsorgan og samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Reinhold A. Nielsen**

brádliga gjørdist sjúkur, andaðist og varð jaraður.

Takk fyri eina vakra løtu í Kristnastovu, og takk til øll tykkum í tóku ímóti okkum á Flogvøllinum. Tað var ein ógloymandi løta at koma úr Smyrli á Krambatanga, og síggja øll tykkum mongu, ið vóru komin saman at taka ímóti okkum, hjartans tøkk skulu tit hava.

Takk til øll tykkum í Salem, fyri hjálpsemi í samband við jarðarferðina og ervi. Takk fyri góð og troystarrík orð bæði í kapellinum og til jarðarferðina.

Takk til øll tykkum, ið á ymsan hátt hjálptu og hjartans tøkk til øll tykkum mongu, sum fylgdu Reinhold til hansara seinasta hvíldarstað á fold.

Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Salem.

***Vegna familjuna***

***Anna, Jón og Charlotta***